# Kundu ikki givið greiðari boð

**Sólbjørn Hansen og Niels Olsen sóu báðir deyða mannin í sjónum. Báðir tosaðu teir við havnarskrivstovuna, og teir kundu valla givið greiðari boð. Tí undrast teir stórliga á, at tað gingu níggju tímar áðrenn byrjað var at leita**

DRUKNIVANLUKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*– Fyri mær sá tað út sum ein deyður maður, og um ikki tað var tað, so mátti tað vera ein ónatúrliga væl eftirgjørd dukka. Tað vóru eisini boðini, sum eg gav Havnaskrivstovuni, sigur Niels Olsen á Lómi*

Tá Lómur legði at kei nýggjársaftan stóðu teir báðir Sólbjørn Hansen og Niels Olsen afturi í reyv á skipinum. Lómur bakkaði ímóti, og tá hann var tveir metrar frá kei, fekk hann eina kraftiga skrúvu, soleiðis at tað ikki skuldi koma ov harðliga innat.

Tá var tað, at teir báðir bóru eyga við deyða mannin í sjónum.

– Fyri mær sá tað út sum ein deyður maður, og um ikki tað var tað, so mátti tað vera ein ónatúrliga væl eftirgjørd dukka. Tað vóru eisini boðini, sum eg gav Havnaskrivstovuni, greiðir Niels Olsen frá.

Hann er yvirstýrimaður á Lómi og saman við Sólbjørn Hansen, fyrsta stýrimanni, sá hann deyða mannin í sjónum.

– Vit gingu bara út frá og roknaðu eisini við, at løgreglan fór at koma umgangandi. Men tað var ikki støðan, sigur Sólbjørn Hansen og undrast.

Við Sosialin í gjár segði Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, at boðini sum vakthavandi á løgreglustøðini fekk, vóru so mikið ógreið og ósikkur, og tí valdu tey at bíða við leitingini.

## Sóu jakka og buksur

Men hetta skilja Sólbjørn Hansen og Niels Olsen ikki heilt.

– Sjálvandi kunnu vit ikki siga heilt víst, at talan var um ein deyðan mann. Men vit vóru báðir á einum máli um, at tað illa fekk verið annað, sigur Niels Olsen.

– Vit sóu enn tá at hann var í buksum, og onkrum sum vit hildu vera ein anorakk. Vit sóu hvønn lit tað hevði, og tey boðini góvu vit víðari og tað hevur eisini víst seg at passa, tá maðurin varð tikin upp og hugt var at honum, sigur Sólbjørn Hansen.

Tað sum teir báðir hildu vera ein anorakk, vísti seg at vera ein jakki, men annars passaði restin – bæði litur á buksum og jakka.

## Ikki hvønndagskostur

At síggja ein deyðan mann á sjónum er ikki hvønndagskostur hjá nøkrum. Tí gjørdust teir báðir eitt sindur illa við, tá teir sóu druknaða mannin á sjónum. Men tað skuldu ganga níggju tímar áðrenn nakar byrjaði at leita eftir druknaða manninum, og meir enn eitt hálvt samdøgur áðrenn teir fingu vátta, at tað sum teir óttaðust var ein druknaður maður, veruliga var ein druknaður maður.

# Bíðaðu í trý korter á Sandvíkum

**Arbeiðið upp á seyðasmoguna á Sandvíkum tarnar nógv ferðsluni til og frá høvuðsstaðnum. Seinnapartin í gjár tók tað upp til trý korter at sleppa ígjøgnum ferðsluljósini, sum sett eru upp á einvegis umkoyringini**

FERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað skapti mikla øsing, tá Landsverk fyri jól boðaði frá, at Kaldbaksvegurin skuldi steingja í nakrar dagar meðan arbeitt var við at gera eina seyðasmogu undir vegnum á Sandvíkum.

Eftir at eisini landsstýrismaðurin í vinnumálum legði seg út í málið, broytti Landsverk ætlan og í staðin varð gjørd ein lítil umvegur kring har, sum seyðasmogan verður gjørd.

Hetta sissaði fólk aftur, men í gjár og í morgun eru fólk aftur farin at ilskast. Har sum lítli umvegurin kring seyðasmoguna er, gongur ferðslan bert annan vegin. Tí verður hon regulerað við ljóskurvum. Men hesar hava yvirhøvur ikki víst seg at rigga nóg væl.

Eftir arbeiðstíð í gjár – frá klokkan 16 og til 18 – bara vaks røðin av bilum, soleiðis at fleiri hundrað bilar stóðu og bíðaðu í Kaldbaksfirði eftir at sleppa norður úr Havnini. Orsøkin til hetta er, ljóskurvin lýsir líka leingi báðar vegir, og tað er ein trupulleiki, tí at ferðslan um morgunin fyri tað mesta gongur suður til Havnar, meðan bróðurparturin av ferðsluni seinnapartin gongur norðeftir.

Seinnapartin í gjár stóðu bilarnir og bíðaðu upp til trý korter, fyri at sleppa framvið einvegis umkoyringini á Sandvíkum.



*Røðin mundi telja fleiri hundrað bilar seinnapartin í gjár, tá fólk ætlaðu sær heim frá arbeiði, men sluppu at bíða í upp til trý korter*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Rendi á russara

Og mitt í øllum ferðslurokanum sum stóðst av ljóskurvunum og umkoyringini á Sandvíkum, hendi eitt ferðsluóhapp við Hvítanes.

Klokkan 17.17 í gjár fekk løgreglan í Havn eina fráboðan frá einum bilførara um, at hesin hevði rent á ein fótgangara sunnan fyri Hvítanesi. Hann var komin koyrandi í bili sínum, og hevði rakt fótgangaran við síðuspeglinum.

11 minuttir eftir at løgreglan hevði fingið fráboðanina, var bæði løgregla og sjúkrabilur á staðnum. Tey kundu staðfesta, at talan var um ein russara, sum var blivin árendur, og at hesin helst hevði brotið beinið. Tí varð hann fluttur á landssjúkrahúsið til viðgerðar.

## Ferðslan vanlig aftur

Men ferðslurokilsi á Sandvíkum er nú av. Við Dimmalætting í gjár segði Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk, at ljóskurvarnar verða tiknar niður á middegi í dag, og so kann ferðslan aftur ganga ótarnað.

Einaferð seinni skal Kaldbaksvegurin aftur steingjast eina nátt, tá ein kaðal skal leggjast undir vegin, men annars skuldi friður verið av arbeiðinum á hesum vegastrekkinum.